## Tær ynsktu sær hús

Herfyri kom út bókin Tær ynsktu sær hús. Í bókini verður greitt frá tí stóra arbeiði, sum kvinnurnar í Føroyska Kvinnufelagnum í Keypmannahavn gjørdu fyri at savna pening, so tær kundu keypa eitt hús til føroyingar í býnum. Bókin greiðir eisini frá hinum mongu feløgunum, sum føroyingar í Keypmannahavn hava savnast um í meir enn eina øld. Greitt verður frá virkseminum í teimum húsum, sum føroyingar hava havt til felagsvirksemi sítt, síðani kvinnurnar keyptu fyrsta húsið síðst í sekstiárunum. Christin Plate og Elsa Zachariasen hava lagt bókina til rættis




## Søgan um Meinigheitshúsið

Meinigheitshúsið í Havn, er 5. bókin í røðini um Kirkju og Missiónssøguna í Føroyum. Her er at lesa um, tá ið gamla Meinigheitshúsið varð bygt, arbeiðið sum har var, inntil húsið gjørdist ov lítið, stríðið um grundøki til nýggja Meinigheitshúsið, og arbeiðið sum har er í dag. Í bókini, sum er 351 blaðsíðir eru sera nógvar myndir. Jóhs. Andr. Næs hevur skrivað bókina og savnað myndirnar. Tað er Heimamissiónsforlagið, sum gevur bókina út. Bókin keypast í bókhandlunum í landinum og frá www.hmf.fo

# Lítið hugaligt at halda føðingardag

**Føroya Reiðarafelag fyllir hundrað ár í dag, og sambært formanninum, Viberg Sørensen, so er fiskivinnan í løtuni ikki ein vinna fyri pessimistar**

FØÐINGARDAGUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føðingardagar plaga oftast at vera hugaligir at halda, men sum støðan er í fiskivinnuni í løtuni, heldur formaðurin, Viberg Sørensen, at lítið er at rópa hurrá fyri.

- Eg havi nú sitið sum formaður í eitt gott ár, og tað má sigast, at tað hevur brotið í bæði borð líka síðani eg tók við, sigur Viberg Sørensen.

Men hetta er hinvegin ikki nakað nýtt. Verður hugt í gomul bløð sæst, at fyri júst hundrað árum síðani komu reiðarar saman at umrøða vanlukkuligu støðuna í fiskivinnuni, og tað er nógv ið týðir á, at støðan tá einki mætari var enn hon er í dag.

- Vit liva í einari vinnu, sum er púra óforútsigilig. Vit hava onga hóming av, hvussu komandi ár fer at roynast, sigur Viberg Sørensen.

Í løtuni er lítið hugaligt at fáast við fiskivinnu, tí partvís er lítið at fáa, og partvís er prísurin í botni.

- Fiskaprísurin er raplaður niður í botn, og tað ber næstan ikki til at sleppa av vi tosk fyri ein rímiligan prís. Hetta er tó ikki bert galdandi fyri okkum. Men eisini hýsuprísurin er í botni, hann hevur verið heilt niðri á fýra krónum, sigur Viberg Sørensen.

### Halda dagin í mars

Formaðurin í Reiðarafelagnum sigur tó, at tað er heldur frægari við oljuprísinum. Men heldur ikki her er tó gott.

- Oljuprísurin í londunum uttan um okkum er millum 1,00 og 1,20 krónur lægri, og tað hevði fløvað almikið, tá uppgjørt verður. Ein lemmatrolari bunkrar kanska eini 50.000 til 60.000 litrar og tað er lætt at rokna út, hvat sparingin tá er við einari krónu minni pr. litur, sigur Viberg Sørensen.

Hann sigur, at ein vanligur lemmatrolari bunkrar eitt stað millum 1,5 og 1,7 milliónir litrar um árið, og ein króna bíligari fyri liturin hevði gjørt stóran mun á botnlinjuni.

Formaðurin sigur annars, at teir ikki fara at gera so nógv burtur úr degnum í dag.

- Tað er ikki akkurát rætta tíðin nú beint upp undir jól at halda stóran føðingardag, so tað verður bara nevndin, sum hittist til ein døgurða í kvøld. Vit fara so at gera meiri burtur úr degnum fyrstu vikuna í mars, sigur Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag.



*Tað er lítið hugaligt at halda rundan føðingardag í hesum døgum, heldur Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag*

# Berjast um Bagger bók

**Fleiri donsk forløg berjast nú um at verða fyrst við bókini um gøluna kring vinnulívsmannin Stein Bagger**

BØKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@soialurin.fo*

Dramaið kring fyritøkuna IT Factory, og stjóran, ið hvarv, hevur tilfar til eina háspenningssøgu av teimum heilt stóru.

Tí kappast donsk forløg nú av øllum alvi um at verða fyrst á gøtuni við bókini um gøluna, ið er ein tann størsta í donskum vinnulívið nakrantíð, veit Politiken at siga.

Forløgini Lindhardt & Ringhof, Gyldendal og Børsens forlag liggja longu framvið og fleiri leggjast nú afturat. Ikki so løgi, tí sum Jeppe Markers frá Lindhardt & Ringhof sigur:

"Søgan um Stein Bagger og IT Factory hevur alt, sum ein góð søga skal hava. Verður søgan søgd á rættan hátt, fer bókin at selja í tíggjutúsundavís"

Ein av teimum, sum verður hildin at verða rætti høvundurin til eina slíka bók, er journalisturin Dorte Toft, sum hevur viðgjørt málið í Berlingske Tidende. Og Toft váttar, at áhugin fyri at fáa hana at skriva bókina er stórur.

"Higartil hava eini átta níggju forløg vent sær til mín", sigur Dorte Toft, sum samstundis váttar, at hon nú er líka við at skriva undir ein sáttmála við eitt forlag.



*Tað er ikki bara løgreglan, sum vil hava klørnar í søguna handan danska vinnulívsmannin Stein Bagger. Eisini donsk bókaforløg liggja nú framvið*

# Gunnar Hoydal fær fimm stjørnur

**Skaldsøgan "Dalen" (Dalurin fagri) eftir Gunnar Hoydal fær 5 av seks stjørnum í Berlingske Tidende**

UMMÆLI

Herfyri gav forlagið Torgard út skaldsøguna Dalurin Fagri hjá Gunnari Hoydal í danskari týðing eftir Jette Hoydal.

Bókin varð sera væl móttikin á Berligsk Tidende, har ummælarin Anne Lise Marstrand-Jørgensen gav bókini fimm av seks stjørnum.

Undir yvirskriftini "Sygdom og skønhed på Færøerne" skrivar ummælarin millum annað:

"Hoydal beskriver drengens verden så poetisk og indlevet, at det er umuligt ikke at blive berørt. Landskabet, skæbnerne og sygdommens tragedie står på én gang knivskarpt i den historiske sammenhæng og bredes ud til evigtgyldige menneskelige temaer. I Dalen spirer tro, håb og kærlighed side om side med sorg, lidelse og død. Det er en smuk, skræmmende og velkomponeret fortælling, der slynger sig gennem Påls indre og ydre verden."

Eisini forlagið Torgard, ið Hugin Eide stendur fyri, fær rósandi orð frá ummælaranum:

»Dalen« kom út í Føroyum í 1999, og forlagið Torgard skal hava rós fyri at hava átikið sær uppgávuna at fylla eitt tómrúm á danska bókamarknaðinum, nevniliga føroyskar bókmentir í danskari týðing. Tað er ótrúlig, at meir etableraði forløg ikki hava víst føroyskum rithøvundum størri áhuga, sigur Anne Lise Marstrand-Jørgensen, ummælari á Berlingske Tidende.




*Ein vøkur, ræðandi og vælkomponerað frásøgn, sigur danskur ummælari um skaldsøguna "Dalurin fagri" eftir Gunnar Hoydal*